

## Almenn umbering til Shevchenko

Enska blaðið Daily Mirror skrivaði í februar mánaði, at Shevchenko als ikki treivst í felagnum. Og eisini varð spælarin endurgivin fyri at siga, at hann og venjarin ikki sótu væl um sátt.

- Vit skrivaðu, at Andriy Shevchenko hevði gjørt samrøðu við týska www.sport.ard.de, har hann greiddi frá ónøgd síni um venjara sín, Jose Mourinho. Og at hann har segði seg hava spælt fyri fleiri betri venjarar, og at hann fegin vildi sloppið úr felagnum í janar.

- Nú vit hava kannað málið nærra, eru vit komin eftir, at hetta er ósatt, og at Andriy Shevchenko als ikki hevur gjørt samøðu við týsku heimasíðuna, skrivar Daily Mirror.

## Esbjerg steðgar kortspælið

Leiðslan í danska felagnum Esbjerg hevur sett bann fyri, at spælararnir spæla kort um pengar. Esbjerg hevur ikki staðið seg væl í superliguni í vár, og ein orsøk skal verða, at spælarar skylda hvørjum øðrum pengar av kortspæli. Ítróttarstjórin í Esbjerg sigur, at upphæddirnar eru blivnar so stórar, at leiðslan vil ikki spæla við longur og hevur bannað kortspæli millum spælararnar.

B71 – GÍ 1-1 (0-0)

# Soltið hjá sandoyingum móti skurunum

**GÍ vóru meiri enn hepnir, tá teir sluppu við eina stiginum av Sandoy, tí B71 svam í møguleikum í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki var GÍ omaná, men hóast hetta munnu skurnarnir helst kenna at teir eiga ein mann við navninum Geza Turi**

*B71*

*GÍ*

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Magnus Olsen skaffaði B71 fyrsta stigi á heimavølli í ár*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Geza Turi var bjargingin hjá GÍ, bókstavliga. Hann helt teimum inni í fyrra hálvleiki, og tá farið var um vanligu leiktíðina hevði hann enn eina frágera góða bjarging, sum bjargaði GÍ eina stigi.

Hóast nógvar kjansir, so kom ikki mál í fyrra hálvleiki. Sjálvt tá ein sandoyingur slapp at renna einsamallur móti málinum, fekk Geza Turi vart fyri.

Tí var tað eisini ein heldur undarlig kensla, ið heimaáskoðararnir stóðu við, tá liðini fóru til hálvleik. B71 spældi væl og fráveran av stýrimanninum á miðvøllinum, Eli Hentze, var ikki til at fáa eyga á. Alt riggaði hjá B71, uttan tað týdningarmesta, nevniliga at skora mál.

### Tvey mál innan ein minutt

Og tá so B71 ikki skorar, so skoraði GÍ beint eftir steðgin. Sjálvandi, freistast man næstan at siga. Tomasz Saidak langaði bóltin móti málinum, Símun Rógvi Hansen bjargar, men Jonreid Dalheim var kvikur á returinum og legði GÍ framum.

Skelkandi fyri sandoyingar, tí leiðslan GÍ nú fekk, var á ongan hátt í samsvar við tað, sum higartil var hent í dystinum. Skelkurin var tó ikki størri enn so, at B71 svaraði aftur minuttin eftir málið hjá GÍ.

Eitt frísparksinnlegg úr høgru endaði inni í brotsteiginum, og eftir av eitt sindur av trunkaspæli, setti Magnus Olsen bóltin í netið.

So hendi heldur ikki meira hvat málum viðvíkur í dystinum. Ikki tí, møguleikar vóru til fleiri mál, men hvørki Símun Rógvi Hansen ella Geza Turi mettu, at tað var neyðugt við fleiri málum.

Hevði B71 verið omaná í fyrra hálvleiki, var GÍ vandameira liðið í seinna hálvleiki. Teir fingu eisini bóltin í netið hjá B71 einaferð, men dómarin metti, at Sámal Joensen hevði verið í harðligur við Símun Rógva Hansen. Tí kolldømdi hann málið.

Iðraðu gøtumenn seg um, at teir ikki fingu leiðsluna við hesum málinum, so eiga teir at prísa seg lukkuligar fyri, at Geza Turi var vakin í yvirtíðini av dystinum. Ein drønstútari eftir hornaspark hevði beina kós móti málinum, men einans ein framúr góð bjarging frá Geza Turi gjørdi, at hesin bóltur ikki endaði í málinum.

### Báðir partar iðra seg

Soleiðis ber til at staðfesta, at B71 heldur ikki skuldi vinna á heimavølli í gjár. Magnus Olsen syrgdi tó fyri, at sandoyingar fingu sítt fyrsta stig á heimavølli í ár, og í so máta var tað ikki so galið hjá sandoyingum. Men galið var tað kortini, tí teir høvdu allar møguleikar til at avgera dystin í fyrra hálvleiki, men annaðhvørt vóru teir ikki nóg neyvir ella stóð livandi ungarski múrurin fyri.

Tískil endaði dysturin við, at bæði liðini iðraðu seg um, at hava mist sigurin. Sandoyingar, tí teir ikki vóru nóg neyvir í fyrra hálvleiki, og GÍ tí seinna mál teirra varð kolldømt.

## – Geza var fantastiskur

– Soleiðis sum dysturin tók seg út, so er ein javnleikur eitt okey-úrslit hjá okkum, sigur málskjúttin hjá GÍ, Jonreid Dalheim.

– Burtursæð frá kolldømingini av okkara seinna máli, so eri eg væl nøgdur, sigur hann.

Gøtumenn høvdu helst sett nøsina upp eftir meiri enn eina stignum í gjár, men kunnu takka Geza Turi fyri, at teir ikki vóru aftanfyri við nógvum málum, tá hálvleikur var.

– Málmaður okkara var heilt fantastiskur, og tað var ein fantombjarging, hann hevði í yvirtíðini, heldur Jonreid Dalheim.

## – Væl og virðiliga betri

Ungi málverjin hjá B71, Símun Rógvi Hansen, heldur ikki tað var í lagi, at dysturin endaði við stigabýti millum liðini.

– Nei, vit áttu at fingið fleiri mál í fyrra hálvleiki, har vit vóru væl og virðiliga betri enn GÍ og høvdu kjans oman á kjans.

Í seinna hálvleiki var GÍ oman á og teir fingu eisini bóltin í netið ta einu ferðina. Málið var tó kolldømt, og tað var ein røtt avgerð, sigur Símun Rógvi Hansen.

– Eg fekk ein alboga ella ein arm inn á kjálkan, so eg meti har var frískpark. Og ja, vit verða eisini lagdir undir eitt ávíst trýst, men samanumtikið áttu vit at fingið meiri burturúr, sigur málverjin hjá B71.